# Føroysk oljuframleiðsla nærri

**Nevndin í Atlantic Petroleum hevur just vitjað Sevan Hummingbird pallin, sum skal fáa oljuna upp á Chestnut leiðini í Norðsjónum seinni í ár**

OLJUMENNING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um somu tíð sum gjørt verður klárt at fara undir at bora sætta brunnin á føroyska landgrunninum er eisini nógv føroyskt oljuvirksemi uttan fyri mark. Eitt nú á oljufelti í Norðsjónum, sum føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er partur av.

Tað hevur verið klárt at taka oljuna upp frá Chestnutfeltinum í eina tíð. Atlantic Petroleum eigur 15% í Chestnut. Oljufelagið Venture er operatørur. og tann tøkniliga loysnin, sum vald er, er ein stór boya við allari neyðugari útgerð, sum tekur 300.000 tunnur av olju, ið verða pumpaðar upp frá pumpum, sum standa á botninum á Chestnut feltinum.

Tað er norska felagið Sevan, sum hevur ment hesa spennandi og øðrvísi loysn, sum er sera nýskapandi og tøkniliga og fíggjarliga dygg sigur AP í tíðindskrivi. Fyrsta boya av hesum slag varð togað til Brasilia til brasilska oljufelagið Petrobras í summar, og verður royndarkoyrd nú. Samtakið Venture, Bow Valley og Atlantic Petroleum fáa tann næsta pallin av hesum slag í næsta mánað. Sambært Sevan eru 4 boyur afturat umbidnar.

Sjálv boyan er smíðað á Yantai Raffles skipasmiðjuni í Kina og fór umborð á einum flutningsskipi úr Kina til Rotterdam 8. mars 2007. Hon var frammi í Rotterdam á Keppel Verolme skipasmiðuni 14. mars. Har hevur hon verið útgjørd síðani.

### AP Nevndin skoðar Hummingbird

Nevndin í Atlantic Petroleum var í Amsterdam 26. september og fekk eina gjølla gjøgnumgongd av øllum pallinum, og fekk vissu fyri, at arbeiðið hevur gingið eftir ætlan, og at 91 % av øllum arbeiðinum er gjørt.

Væntandi verður boyupallurin á Chestnut feltinum í næsta mánað og tá allar royndir eru lidnar fer fyrsta oljan hjá Atlantic Petroleum at renna. Tað verður eitt stórt stig fyri Atlantic Petroleum, tá fyrsta oljan fer at renna. Fleiri túsund føroyingar og útlendingar hava partabrøv í felagnum, sum eisini er við í oljumenningini í írska havinum eins og á føroyska landgrunninum.


*Nevndin í Atlantic Petroleum vitjar oljupall í Rotterdam*
*Mynd Óli Hammer*

## BP setur borin í 13. oktober

SÆTTI BRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Bretska oljufelagið BP setir borin í føroysku undirgrundina um umleið 10 dagar, leygardagin 13. oktober. Hetta er sætti brunnurin, sum verður boraður við Føroyar. Skrivar Portalurin –Hetta er helst tað nærmasta vit kunnu koma einum dato sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum. Hann er sera fegin um, at tað loksins eydnast at fáa boripallin, nú bíðað hevur verið eftir honum í nakrar mánaðir. Transocean Rather, sum hevur borað fyri Chevron á Rosebankkelduni í bretskum øki í skjótt eitt ár, kemur eftir ætlanini inn á føroyska landgrunnin sunnudagin 7. ella mánadagin 8. oktober. Tað fara so at ganga nakrir dagar til at fáa fest pallin í undirgrundina og gera alt klárt. Gongst sum ætlað, og tað viðrar, verður borurin settur í 13. oktober.

Hjarnar Djurhuus sigur við Portalin, at tey trý feløgini, sum eru við í boriverkætlanini, BP, Shell og Anadarko, øll eru sera spent um boringina og vóna, at tað fer at ganga væl.

–Vit vóna at koma á mál skjótast men eru eisini greiðir yvir, at hetta er eitt nýtt øki borað verður á og eisini á vetrartíð, so ilt er at siga, hvussu leingi boringin fer at vara. Hon kann koma at taka upp til fýra mánaðir leggur hann aftrat.

Ein orsøkin til at hetta fer at taka tíð er eisini tann sannroynd, at borast skal gjøgnum tjúkkar basaltfláir, tó at man ikki veit við vissu, hvussu tjúkkar hesar eru. Óttin fyri at bora gjøgnum hart basalt er tó ikki tann sami sum hann var, áðrenn Statoil fór at bora Brugduna í fjør. Tá vísti tað seg tó ikki at vera nakar stórur trupulleiki at bora gjøgnum basalt. Williambrunnurin, sum BP sum fyristøðufelag nú fer í holt við, verður 4750 metrar djúpur tvs. at borað verður væl djúpri enn flestu av hinum brunnunum á landgrunninum. Hetta er so tann sætti brunnurin, sum verður boraður á føroyska landgrunninum síðani ár 2000, tá fyrstu leitiloyvini vórðu latin.

Á oljubasanum í Runavík er nógv virksemi í løtuni, ikki færri enn tvey supplyskip gera klárt at flyta vøru og útgerð út á pallin, tá hann kemur inn á føroyskt øki. Ein føroyingur fer at arbeiða umborð á Transocean Rather, meðan hann borar her. Tað er sjúkrasysturin Óluva Danielsen.

Stórur áhugi er í altjóða oljuheiminum fyri hesum brunninum, tí eitt oljufund á føroyskum øki kann fáa nógv fleiri altjóða oljufeløg at venda eyguni móti øllum Atlantsmótinum, sum Føroyar eru partur av. Hóast sannlíkið fyri at gera eitt fund er kanska ikki meira enn eitt út av tíggju, so verður Williamprospektið mett at vera meira áhugavert enn Brugdan. Orsøkin er m.a. tann, at jarðløgini eru øðrvísi og borað verður væl djúpri.

